# Tá orð fáa hold ella tá tey renna burtur sum blágómi fyri sól

JÓAN PAULI JOENSEN
Rektari á Fróðskaparsetri Føroya



Eftir viðgerðina í Fíggjarnevndini varð úrslitið, at uppskotið frá Mentamálaráðnum verð skorið við góðum 6 milliónum krónum, hetta gekk serliga útyvir tað gamla Fróðskaparsetri meðan Læraraskúlin og Sjúkrarøktarfrøðiskúlin sluppu rímiliga snikkaleysir. Rektarin, vararektari og fyrisiting setursins gjørdu eitt stórt arbeiði fyri at greiða bæði Fíggjarnevndini og løgtingstingmonnum frá fíggjargrundalagnum og teimum fylgjum, sum hetta fór at fáa fyri okkara einasta universitet, sum skal framleiða vitan og útbúgva fólk, men har var einki at gera, tað var sum at tosa fyri deyvum oyrum. Tað vóru kortini teir tingmenn, sum tyktust at lurta og vóru sera fyrikomandi, men so vóru tað aðrir, sum styggir titaðu aftur og fram eftir teimum bonaðu gólvinum, onkur á leistum, uttan at orð fekst á teir. Ein vinsælur tingmaður var so mikið erligur at siga, at í tí politiska arbeiðinum var tað so, at tess minni ein visti um tey einstøku málini, tess lættari var tað at taka støðu sum tingmaður og lættari at skera.

Tá saman um kom, so vísti tað seg, at tað sáð, sum sáa varð frá setursins síðu, fall meira ella minni á gaddajørð. Tað kom fram, at undir nevndarviðgerðini hevði tað eydnast tí sera gløgga fíggjarnevndarformanninum - helst besta høvd í tinginum, at rúnabinda alla fíggjarnevndina væl og virðiliga við sínum magisku roknistykkjum, at allur hópurin í nevndini var paralyseraður fyri ikki at siga hypnotiseraður. Onkur var so fullvísur í, at varð nakað broytt í semjuni, so vildi alt tingarbeiði enda í einum gantrileiki ella eini kollektivari psykosu, har eingin tingmaður fór at duga sær hógv, og undirskotið et koma uppá eina milliard.

Seinast í 1980-unum var hugburðurin millum nógvar politikarar sera positivir móti setrinum, ikki minst Lasse Klein, sum var mentamálaráðharri, tá. Fróðskaparsetrið varð gjørt til universitet í 1987. Ætlanir vóru lagdar um granskning og um útbúgvingar. Men so kom kreppan ikki bert steðgaði menningin, men nógv virksemi var tikið av, samstundis sum játtanin svann. Síðani batnaðu tíðirnar og okkurt av tí mista varð vunnið aftur, men eitt nú kom gudfrøðiútbúgvingin ongantíð aftur.

Tá vit komu til 2008 vóru orð sum altjóða universitet og granskingarpark komin upp í retoriska vokabularið hjá politikarunum. Góðtrúgvin hildu vit øll, at tað nú var ein erligur politiskur vilji í Føroyum til at ganga nýggjar leiðir og broyta samfelagið frá einum siðbundnum veiðumannasamfelag til eitt modernað vitanarsamfelag. Eitt samfelag, sum skuldi skapa nýggjar møguleikar og nýhugsan. Tað besta var, at nú var samanfall millum áhugamálini hjá Fróðskaparsetrinum, Mentamálaráðnum, Meginfelag Føroyskra Studenta og føroyskum politikarum. Hildið var at tað var ein møguleiki at koma til eina tvørpolitiska semju um hetta. Tíverri var samanfallið millum áhugamálini tann beri retorikkur hjá politikarum – ein tómur retorikkur og spælan við orðum.

Tá tað kom til at geva retorikkinum veruligt hold, fóru politikararnir at ristast á hondunum, tað var meira gloppið av munninum enn megi og vilji var til at fremja. Kunnleiki, vitanarframleiðsla og undirvísing tapir fyri tunlum, uttan eitt ilt orð skal verða sagt um tær, men tunlar eru ikki nóg mikið til at fáa fólk at trívast í einum landi, sjálvt tá illa stendur til, men tað er ein turkatrúgv millum politikarar uppá hetta.

Tíðirnar eru ringar um allan heim, og tað krevur nýggja orginala politiska hugsan. Tað mest átrokandi millum politikarar er tí, sum onkur av teimum tekur til"at taka luftina úr øllum systeminum", so at bert tann harði substansurin er eftir, og at pláss ikki verður fyri nøkrum nýggjum. Tann politikkurin, sum tykist at hava verið galdandi tey seinastu árini er sum tá børn syngja "mala henda veg og mala handa veg, tralallalalalalla". Tað skapar ikki nakra framtíðar visjónir..

Tað er harmiligt, at allur tann áhugi sum politikararnir fyrr í 2008 tyktust at hava fyri útbúgving og gransking, nú undan stytsta degi, skal verða runnin burtur sum blágómi fyri sól. Hvat setrinum viðvíkur so byrjar tað nýsetta ráðið arbeiði sítt 1. januar. Eitt tað fyrsta sum ráðið skal gera er at seta út í kortið hvørjar útbúgvingar skulu verða verðandi og hvørjar skulu hvørva. Tvær eru longu sleptar fyribils. Sjálvandi er tað harmiligt at vøksturin í hægri útbúgving í Føroyum aftur hesaferð var steðgaður, áðrenn hann rættiliga byrjaði og nógv fyrireiking er farin fyri einki.

*

Jólini koma tíbetur á hvørjum ári, tey liggja føst. Fróðskaparsetur Føroya vil við hesum ynskja øllum eini gleðilig jól og eitt av Harranum signað nýggjár. Eisini vilja vit takka Mentamálaráðnum fyri eitt sera gott samstarv.

# Sum kúgv í stiga

KÁRI Á RÓGVI
løgtingsmaður



Í dag helt hugsjónarliga røðu til 3. viðgerð av fíggjarlógini. Í hesi røðuni heitti eg á løgtingsmenn um ikki at kenna seg bundnar av fíggjarnevndarálitinum, men sum Olgar Danski á sinni at vakna upp til dáð, nú landið stendur í váða. Tók undir við framsøgumanni og formanni okkara, Kára P. Højgaard og hansara tilmælum, men heitti serliga á tingfólk um at atkvøða fyri uppskotum um at tryggja útbúgving, nú vit eru á veg í kreppu, so ungdómurin kann søkja sær lærdóm heldur enn at fara av landinum. Ein guðssonur mín fer á skiparaskúla, nú niðurgongd er, men onnur hava ikki høvi at lesa ella læra sítt fak í Føroyum og fara tí av landinum við makum, børnum og øðrum skyldfólki og vinfólki í hølunum.

Tók til úr vísuni um Burnamann:

*Det var Jomfru Gloriant,*
*Hunn raaber henover de*
*Fanger:*
*Est du levende Olgar*
*Danske,*
*Og est du før at gange?*

Áheitan mín var á tingfólk um ikki at sova, men heldur vakna, um at koma úr fongslinum og ikki vera atkvøðuneyt hjá fíggjarnevndini.

Púra óvart átalaði tann áfalni og óvirðiliga varaformaðurin John Johannesen bæði røðuna í síni heild, tí "hetta var ikki aðalorðaskifti" og serliga "at neyt ikki hava atgongd til tingsalin."

Síðani koma nakrar góðar og siðiligar viðmerkigar frá fleiri tingfólkum, sum eg svaraði aftur. Millum annað vísti eg á, at Sjálvstýrisflokkurin er fyri at gera tunnlar eins væl og skúlar, men at vit vilja hava greiðar avtalur gjørdar, so ikki fleiri íløgur skulu sveima í óvissu, hvørt tær verða framdar til endans.

Loksins spurdi eg fyndmuga og spydiga varaformannin, hvørt rættleiðing hansara skuldi skiljast soleiðis, at ikki bar til at siga, 'at John Johannesen sum formaður klárar seg sum kúgv í stiga?'

Tá gjørdist sonevndi politiski leiðarin hjá javnaðarflokkinumfirtin og tók orðið frá mær, sjálvt um eg ikki hevði biðið um at sleppa siga meira.

Henda átala kann samanberast við mangar av óátalaðu málblómunum hjá monnum sum Óla Breckmann ella Henrik Old ella frá § 266b-kjakinum, tá samkynd veruliga vórðu ósømiliga niðurgjørd – men tey orðini fái eg meg ikki at taka uppaftur.

Soleiðis havi eg hvørki kallað tingfólk "neyt" – eiheldur varaformannin "kúgv" men brúkt tað, tey nevna orðamyndir – metaforar. Orðið "atkvøðneyt" er sera vanligt hugtak í politiskum orðaskifti, ið ikki minst ellisformaður løgtingsins plagar at brúka.

Í brókatátti stendur annars:

*So leikar teirra bátur á lunni*
*Sum leysur knívur í skafti,*
*So var Jóannes í urðini kvikur,*
*Líkasum kúgv í hafti.*

Soleiðis dugdu menn fyrr at taka til. Men John Johannesen er tíverri mentunarliga kúheiðin.

# Sjálvstýrisflokkurin er vaknaður - 7 ár ov seint

HELGI ABRAHAMSEN



Formaður Sjálvstýrisflokssins ger í hesum døgum nógv burturúr, at flokkur hansara atkvøddi ímóti løgtingsfíggjarlógini fyri 2009, og at hetta var gjørt, fyri at stuðla pensjónistunum. Tað er í sær sjálvum ein vakur tanki.

Vanligt er, at tá atkvøtt verður um fíggjarlógina, verður fyrst atkvøtt um eina røð av broytingaruppskotum, har summi verða samtykt, meðan onnur verða feld. Men tá tann "telvingin" er liðug, verður endaliga atkvøtt um fíggjarlógaruppskotið við samtyktu broytingunum. Tá er vanligt, at øll í løgtinginum atkvøða fyri. Hetta skal skiljast sum ein viðurkenning av, at landið skal hava eina fíggjarlóg, og at hetta var tað, sum semja kundi fáast um.

Eg kann bara koma í tankar um eitt undantak frá hesi reglu. Tað var í 2001, tá niðurskurðurin av ríkisveitingini var ein partur av fíggjarlógaruppskotinum. Tá atkvøddu andstøðuflokkarnir ímóti fíggjarlógini, meðan til dømis Sjálvstýrisflokkurin atkvøddi fyri.

Á heimasíðuni hjá Sjálvstýrisflokkinum stendur: "Hetta var níggjunda ferðin, eg atkvøddi í sambandi við fíggjarlóg, men fyrstu ferð, at eg havi atkvøtt ímóti, sigur Kári P. Højgaard, formaður". Hann var also ein av teimum, sum atkvøddu fyri, at ríkisveitingin minkadi frá 1. januar 2002.

Sjálvstýrisflokkurin var í 2001 partur av einum politiskum átaki, har ferðast var um landið við einum boðskapi um, at vit skuldu skipa Føroyar sum fullveldi, og hetta skuldi einki kosta tí vanliga fólkinum í Føroyum. Ein avleiðing av hesum er, at landskassin hevur mist umleið tríggjar milliardir krónur til henda dag, og tað merkja allir føroyingar nú – ikki minst pensjónistarnir.

Eg ivist ikki í, at Kári P. Højgaard er ein hampamaður, sum veruliga ynskir pensjónistunum alt tað besta. Men hann skuldi heldur atkvøtt ímóti fíggjarlógini fyri 2002, tí hon er orsøkin til tey syrgiligu tølini á fíggjarlógini fyri 2009.

Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin